Tíðindablaðið SOSIALURIN

Nr. 154 15. august 2000

Jan Müller 15.08.2000 (14:57)

# Kongur og Stoltenberg vitja føroyska básin á ONS

Og luttøkan hesaferð verður eisini merkt av, at bert fáar dagar undan framsýningini, er vorðið almannakunngjørt, at fyrstu loyvini at leita eftir olju og gassi við Føroyar eru latin oljufeløgum. Ætlanin hevur annars verið at lata loyvini í september, men tað hevur gingið betur enn væntað við arbeiðinum, ogtí hevur dentur verið lagdur á at fáa kunngjørt loyvini, áðrenn føroysku luttøkuna á ONS. Tað merkir so, at størriáhugi verður hjá útlendskum ídnaðarfyritøkum at taka upp samband og samstarv við føroyskar fyritøkur, ið ætla at vera við at veita vørur og tænastur í sambandi við komandi leiting. Umframt tær meira enn 20 føroysku fyritøkurnar, sum verða við á ONS, fara eisini umboð fyri Oljumálastýrið at luttaka, m.a. Eyðun Elttør, landsstýrismaður og Herálvur Joensen, stjóri. Tað er Menningarstovan, sum stílar fyri føroysku luttøkuni. Eftir ynski frá bretum er fundur eisini avtalaður millum Eyðun Elttør og bretska oljumálaráðharran. Elttør fer eisini at fáa høvi at hitta sín norska starvsbróður.